T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

# Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 17. apríl 2000 samtykt broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, at uml. 4.500 m² verða lagdir afturat B3-økinum (økið til smá vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt) við Velbastaðvegin.

Broytingin liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá mánadegi 4. desember 2000 til og við fríggjadagin 5. januar 2001, allar gerandisdagar uttan leygardag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, tó hósdag til kl. 18.00.

Møguligt mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 5. mars 2001.

S N A R S K I V A N

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

# Skrivstovufólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir skrivstovufólki til Snarskivuna.

**Snarskivan**
fyrisitur m.a.:

- avgreiðsluna í Tórshavn og Kollafirði
- telefonumstilling og telefonavgreiðslu
- journal
- ognarviðurskifti
- barnaansing
- internetið/intranetið
- kunning til borgarna sum heild

**Starvið**
Umsøkjarin kemur at røkja nøkur av omanfyri nevndu økjum, saman við dugnaligum og fryntligum starvsfelagum, tó við høvuðsdenti løgdum á barnaansingina.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin er fryntligur og fyrikomandi, kann samstarva við onnur, er førur fyri at halda høvdið kalt í strongari støðu og ikki er bangin fyri at læra og taka hond í har á stendur.

**Vit bjóða**
eitt fjølbroytt starv, har møguleiki er fyri at mennast á fleiri økjum og fáa eina fjølbroytta vitan um kommunal viðurskifti.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast tilber. Lønin verður í 15. lønarflokki, sambært sáttmála millum Føroya starvsmannafelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Mourits Mouritsson, deildarleiðara, ella Elisabeth Carlsson, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 18. desember 2000. Viðmerk á umsóknina "skrivstovufólk".

S N A R S K I V A N

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

# Málsviðgeri

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir málsviðgera til mentamáladeildina.

**Mentamáladeildin**
er deild undir trivnaðarfyrisitingini og hevur umsitingina av tí partinum av føroysku skúlalóggávuni, ið við lógum um fólkaskúla, frítíðarundirvísing o.a. og øðrum skúlalógum er løgd út til kommununa og Tórshavnar skúlaráð.

Deildin hevur um hendi menta- og skúlamál sum heild, ítróttamál og studningar. Mentamáladeildin leggur til rættis og avgreiðir øll mál, sum verða løgd fyri mentamálanevndina og skúlaráðið.

Harumframt skipar deildin fyri hátíðarhald av ymiskum slag, m.a. tá ið árligu heiðurslønirnar verða latnar.

**Nakrar av høvuðsuppgávunum eru:**

- málsviðgerð
- fundarfrásagnir
- skipa fyri og hava fundir um menta- og skúlamál
- samskifta við fólkaskúlarnar, musikkskúlan, kvøldskúlan, býarbókasavnið, kunningarstovuna, svimjihøllina, stadionøkið, ítróttarfeløgini og onnur feløg og einstaklingar, sum arbeiða við mentamálum
- prosjektarbeiði í sambandi við mentanarálitið
- arbeiði í sambandi við nýggju fólkaskúlalógini

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava viðkomandi útbúgving og skal hava teldukunnleika. Skal duga føroyskt og enskt til lítar.

**Persónligar eginleikar**
Umráðandi er, at viðkomandi er áhugaður í mentunarøkinum, dugir væl at leggja til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast tilber. Løn sambært sáttmálanum við avarðandi yrkisfelag.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv við nógvum fjølbroyttum og mennandi uppgávum, har tú hevur møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jákup Simonsen, deildarleiðara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 18. november 2000. Viðmerk á umsóknina "Málsviðgeri".

S N A R S K I V A N

# Frá Nor›urlanda-húsinum

Í sambandi vi› at Føroysk samheitaor›abók eftir Henning Thomsen er útkomin, ver›ur kvøldseta í Nor›urlandahúsinum leygardagin 2. des. kl. 19.30.

Á skránni ver›ur framløga, har bókin ver›ur umrødd vi› sjónvørpu á lørifti. Tórbjørn Jacobsen, landsst‡risma›ur, Jóhan Hendrik Winther Poulsen og a›rir fara at flyta fram rø›ur. Hanus Johansen undirheldur vi› gittarspæli og sangi.

Í ste›ginum ver›ur kaffi og køkur. Eisini signerar høvundurin bøkur, og øll eru vælkomin at støkka inn á gólvi›.

**Nor›urlandahúsi›**

**Brenderup**



## Vognar

Stødd: 205x130x40
Totalvekt: 500 kg
Hjól: 13"

TILBO‹ 7.995 kr.

Vit útvega sleipikrókar til øll bilmerki

**Hansen** · Tlf. 447142 ella 218540

# Kinesolog Oda Fuglø

er at hitta í Klaksvík frá 5.12.-8.12.

**Tlf. 456532 ella mob. 0045 21452217**

Test af hormonalt • Sygisk • Fysisk • Kemisk • Målsætning o.s.v.

# ENNIA-GRAM SKEIÐ OG WORKSHOP

*Í samskifti og persónligari menning*

## "Ennia-grammið" (vikuskiftisskeið)

Enniagrammið er ein lýsing av teimum ymisku persónleikabólkum og hvat ið eyðkennir hugsunarhátt teirra. Enniagrammið er eisini ein vegleiðing fyri tann einstaka, ið ynskir størri persónlig menning, lívsgleði og trivnað. Tú lærir at skilja teg sjálvan og onnur menniskju betur, og speglar hetta aftur í betraðum samskifti við starvsfelagar, familju og vinir.
Meiri fæst at vita við at ringja Ráðgevingarmiðstøðina tel. 441060 – 222280.

**Tíð:** 10. og 11. februar báðar dagarnar frá kl. 09.00-16.00
**Stað:** Føroya Arbeiðarafelag, Tjarnardeild 5, 100 Tórshavn
**Kostnaður:** 1.700 kr. (depos. 700 kr.) íroknað skeiðtilfar –drekka/ábit
**Tilmeldingarfreist:** 29. januar 2001
**Málbólkur:** Øll
**Skeiðleiðari:** Joan Peitersen, stjóri á fyritøkuni Ennea Gram Danmark

## "Workshop" Ennia-grammið – eitt Samstarvsamboð

*Hevur til endamáls:*

- at fáa størri fatan av hvat ið eggjar tí einstaka at loysa uppgávur
- at fáa meiri at vita um sambandið millum orð, eggjan og framtíðarútlit
- at finna serstøku orku og evnir hjá arbeiðsfelagnum og at síggja tey sum serlig og egin íkøst í samstarvinum
- við at skilja hvønn annan betur, at skapa størri virðing fyri arbeiðshættum- og vanum hjá hinum
- fáa víðkaða kunnan um týdingin av at sampakka hinum í arbeiðinum við uppgávuni

**Ennigrammið**

- ger virðið í ymiskleika okkara sjónligt
- staðfestir ymiska orku/evni
- hjálpir tí einstaka at finna, styrkja persónmensku sína, privat og í yrki
- gevur menniskjum møguleika fyri at menna góð og gevandi sambond, sum geva framburð bæði persónliga og í yrki
- ger menniskju før fyri, í øktan mun at eggja sær sjálvum
- hjálpir menniskjum at sampakka arbeiði sínum
- gevur størri førleika at skilja ymsu streingir í felagsskapinum

**Tíð:** 12. febuar frá kl. 13.00-19.00
**Stað:** Hotel Føroyar, Tórshavn
**Kostanaður:** 1.500 kr. (depos. 500 kr.) íroknað skeiðtilfar, drekka og døgurða (kl.19.00)
**Tilmeldinagarfreist:** 29. januar
**Málbólkur:** Einkultpersónar, arbeiðspláss, stovnar, fyritøkur o.a. leiðarar og fólk í fáast við starvssetan
**Skeiðleiðari**: Joan Petersen, stjóri á fyrtøkuni Ennia Gram Danmark

Meira fæst at vita við, at ringja ella skriva til Ráðgevingarmiðstøðina
v/ Dianu Borgnyardóttir, 513 Syðrugøtu, tel. 44 10 60 - 22 22 80.
Teldupost: dkonsult@post.olivant.fo



Sosialurin - 311820

# Stóra bringu

## -ella lítla?

**Visti tú at 80% av øllum kvinnum ganga í skeivari BH-stødd?**

**Vælkomin inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa og vegleiða tær at finna júst tína stødd. Ring til okkum og avtala tíð.**

**Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm. í ummáli, og frá AA til H skál.**

**Vit hava eisini korsilett í stórum støddum**

siri
lív & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18
100 Tórshavn
Tel./Fax 316610




Coca-Cola

# COCA - COLA CUP

**B68 bjóðar øllum gentum og dreingjum at gera lið til kapping í fótbólti í ítróttarhøllini í Runavík í døgunum 9. og 10. desember 2000**

### Reglur o.a.

- **Spælt verður við stórum málum (smápiltamálum).**
- **Á hvørjum liði eru 5 leikarar, 4 útileikarar og 1 málmaður.**
- **Loyvt er at hava 1 eykaleikara.**
- **Luttakarakostnaður: kr. 200,- fyri hvørt liðið.**
- **Øll liðini skulu hava rættulig fótbóltsnøvn, sum t.d. B68, HB, Liverpool, Pharma osfr.**

Sosialurin - 311820

### Aldursbólkar

| | |
|---|---|
| 1. Pinkulingar | (f. 93 og yngri) |
| 2. Smápiltar | (f. 91-92) |
| 3. Piltar | (f. 89-90) |
| 4. Smádreingir | (f. 87-88) |
| 5. Dreingir | (f. 85-86) |
| 6. Gentur | (f. 91 og yngri) |
| 7. Gentur | (f. 89-90) |
| 8. Gentur | (f. 87-88) |
| 9. Gentur | (f. 84-86) |

### Tilmelding

**Fer fram á tel. 448748/ 448082 og 448199 millum kl. 19.00-21.00**

Seinasta freist mikukvøldið 6. desember.

### Heiðursmerkir o.m.a. frá Coca Cola

- Heiðursmerkir til nr. 1, 2 og 3
- T-shirts **til nr. 1 í hvørjum bólki**
- Coca Cola **til allar leikarar**

**Stuðul til kappingina**

Coca-Cola

**Tofta Ítróttarfelag**

J|Ä|S|P|I **KETLAR**

*Teir vælumtóktu ketlarnir eru á goymslu*



**Bæði dupultir og einkultir**

Skulu tygum hava nýggjan ketil, so tosið við okkum og fáið eitt gott tilboð. Vit hava serkøn fólk, ið geva eina skjóta og góða tænastu.

**- Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum**

**MARIA POULSEN & CO**
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000